

## Fimti hvør arbeiðsleysur

Tað stendur einki serligt til innan byggivinnuna í Danmark, og sambært boersen.dk er fimti hvør innan vinnuna arbeiðsleysur. Sambært hagtølunum er arbeiðsloysið uppi á 20,9% í viku sjey. – Sjálvt um arbeiðsloysið er hækkað munandi á landsstøði, er tað einki aftur ímóti økingini innan byggivinnuna, sigur fíggjarligi ráðgevi hjá Dansk Byggeri, Andreas Fernstrøm. Tað stinga seg ikki nógvir nýggir bygningar upp í hesum døgum. Øll byggivinnan er hart rakt av kreppuni, men serliga nýbygging liggur still í løtuni. Meðan tað í 2006 vórðu bygd 33.000 nýggj hús verður bert roknað við 10.000 í 2010. Nýggj tøl frá Danmarks Statestik vísa, at arbeiðsloysi í februar fall niður á 4,1% og tað merkir, at arbeiðsloysið í byggivinnuni er sera høgt. – Ein stórur partur av mununin kemst av, at byggivinnan ikki er tillagað vertíð, men tað broytir ikki upp á tann veruleika, at arbeiðsloysið í byggivinnuni er munandi hægri enn í øðrum vinnum, sigur Andreas Fernstrøm við heimasíðuna boersen.dk.

# Ovin fann lívið aftur

**– Lív mítt fór totalt í svart, tá eg fekk boðini um at eg aldrin fekk ta fullu sjónina aftur, sigur vestmenningurin Olvin Klein Olsen. Hann er nú komin fyri seg aftur, og úrslitið hoyrist á nýggju fløguni »Tilbage til livet« sum kom út í farna mánaði. Allir teir 14 sangirnir eru tiknir úr egnum barmi**

VITJAN
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Vejen, Danmark:** Hetta var ein vanligur dagur í mai mánaði 2006.

Árstíðin bjóðaði til sól, hita og ljós, men soleiðis var ikki hjá Ovin, sum hevur búð í Danmark í mong ár.

– Eg vaknaði henda morgunin, tendraði sjónvarpið fyri at vita hvat nýtt stóð á tekstvarpinum. Men eg legði tá merki til, at eg sá næstan einki.

– Nei, hjá mær var alt grátt í grátt, greiðir hann frá.



*Ovin Klein Olsen soleiðis sum vit kenna hann - við guittarinum. – Tónleikurin bjargaði lívi mínum, sigur tann nærum blindi tónleikarin og guittarlærarin*

Støðan hjá honum gjørdist ikki betri av, at læknarnir søgdu honum at sjónin fór ikki at gerast betri við tíðini. Heldur hinvegin:

Ovin fekk nevniliga at vita, at hann mátti fyrireika seg uppá eitt lív sum sjónveikur, har sjónin ein dag kundi hvørva heilt.

– Ja, hetta kom sum eitt sjokk fyri meg. Eg fór totalt niður í kolkjallaran.

### Trupul morgunstund

Ovin Klein Olsen hevði nóg mikið at takast við hesa tíðina, sum leiðari av eini matstovu.

– Her gekk eg og trúði, at lívið sum sum krógveigari skuldi vara við, heilt til eg ikki orkaði at tyggja smør meiri. Men eg fekk annað at síggja, leggur hann dent á.

Eftir einari lítlari morgunstund varð lív hansara broytt fullkomuliga. Frá at hava verið sera virkin í fyritøkuni, til eitt heilt annað lív, har hann varð 100 prosent bundin av hjálp frá øðrum.

– Ja, eg kom so langt út, at eg setti spurnartekin við um hetta lívið var vert at liva.

Tíbetur broytti hann hugsan. Og við hjálp av næstringum sínum fann hann lívið aftur, sum hann tekur til.

– Eg havi altíð elskað tónleik. Og hann varð bjargingin hjá mær, tí eg byrjaði faktiskt at skriva sangir um støðuna hjá mær.

– Hetta hjálpti mær, tá eg var longst niðri, sigur Ovin, sum kann fegnast um at fløga hansara hevur fingið góða móttøku í Danmark.

> *Sangirnir eru skrivaðir við einum einasta endamáli: At fáa onnur at hugsa eitt sindur meiri um lívið og ikki koyra avstað við 150 km/t.*

### 150 km/t

Á fløguni eru 14 sangir sum hann nú ynskir at luta saman við øðrum. Hvør einasti sangur hevur sína søgu, sum hevur hjálpt honum í teirri ávísu støðuni.

– Sangirnir eru skrivaðir við einum einasta endamáli: At fáa onnur at hugsa eitt sindur meiri um lívið og ikki koyra avstað við 150 km/t.

– Júst hetta evnið snýr tann eini sangurin seg um - hetta at hugsa um lívið á lívsins vegi, sigur Ovin Klein Olsen.

Hann ynskir tí fegin at koma út til onnur at siga frá sangum sínum og framføra teir. Tí, sum hann sigur: - Um eg bert fekk ein persón at hugsa meiri um seg sjálvan, sítt egna lív og sína egnu familju, so var tað ikki til fánýtis.

Hann vendir sær eisini til manligu lurtarar sínar, og sum hava trupult við at lurta eftir áváringunum, sum kroppurin og umhvørvið senda teimum.

– Hetta hevði eg eisini trupult við, og tí siti eg í dag sum ein »kvart grønsag«, sum hann brosandi tekur til.

### Vitjar Føroyar

Í hesum døgum vitjar Ovin Klein Olsen í Føroyum. Hesar dagarnar fer hann at hava framførslur á ymiskum støðum. Skráin hjá honum er henda:
3. apríl kl. 16 á Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna
7. apríl kl. 19 í Hoyvíkar kirkju
9. apríl kl. 19 í Gøtu kirkju
10. apríl kl. 19 í Kollafjarðar missiónshúsi
11. apríl kl. 17 í Sørvágs missiónshúsi
12. apríl kl. 19 í Christianskirkjuni Klaksvík

# Virkin hjún vitja Oasuna

**Eins og undanfarin ár skipar FRÍKIRKJAN OASAN fyri stórari páskastevnu. Høvuðstalararnir verða Stephan og Anne Christiansen úr Noregi, eins og fleiri føroyingar**

Hjúnini Stephan og Anne koma at tala á kvøldmøtunum skírishósdag, langa fríggjadag, páskaaftan og páskadag, umframt eisini á ungdómstiltakinum sum verður langafríggjadag.

Hetta er aðru ferð, tey koma til Føroya í samband við páskastevnu. Tey vóru høvuðstalarar í Kelduni á páskastevnuni í 2007.

### Virkin hjún

Stephan Christiansen er norskur kristniboðari. Frá ungum árum av hevði hann eina visión um at boða evangeliið til ungdómin. Avleiðingin av hesum bleiv stovnanin av næminga- og studentafelagsskapinum Ny Generasjon, sum í 1993 byrjaði sum evangeliseringsarbeiði millum studentar á universitetinum í Oslo.

Hetta tiltakið er eitt tvørkristiligt næminga- og studentaarbeiði, ið hevur til endamáls, at næmingar og studentar skulu boða evangeliið á øllum skúlum og læriplássum í Noregi. Í 1998 bleiv Ny Generasjon stovnað í Danmark, og í 1999 í Íslandi, og er nú annars í mongum øðrum londum.

Hjúnini bæði hava eisini verið við til at stovna felagsskapin Jesus Revolution, ið er ein kristin ungdómsrørsla, sum byrjaði í Noregi í 1997, og hevur sum endamál at boða evangeliið til europeiska ungdómin.

Anne Christiansen byrjaði annars felagsskapin JesusKvinnur í 2003 undir eini stevnu í Oslo. Saman við manni sínum er hon leiðari í JesusChurch í Oslo.

Á heysti 2005 vitjaði Anne Christiansen í Føroyum, og skipaði hon tá fyri einari JesusKvinnu-stevnu í Oasuni.

**sb.**



*Oasan skipar aftur í ár fyri páskastevnu, hesaferð við norskum hjúnum sum høvuðstalarum*